

## Magnus vann á Topalov

Sensationelt er 16 ára gamli Magnus Carlsen úr Norra fremstur í Linares 2007. Seks umfør eru leikt og hann hevur 4 stig. Magnus hevur m.a. vunnið á Veselin Topalov (Topalov gavst í javnari støðu), Vassily Ivanchuk og Alexander Morozevich.

Næstir Magnusi eru Viswanathan Anand og Levon Aronian við 3,5 stigum. Peter Leko, Peter Svidler og Ivanchuk hava 3 stig, meðan Topalov og Morozevich einans hava 2 stig. Dupultumfør, ella 14 umfør skulu telvast.

## Endaumfar í Havn

Liðkappingin í talvi endar komandi leygardag, tá allar deildirnar telva seinasta umfarið. Hetta verður í Havn, har spenningurin millum vestmenningar og klaksvíkingar ivaleyst verður ovurstórur við seinastu borðini. Men eisini í hinum deildunum kann nógv henda. Byrjað verður kl. 12 leygardagin, og er skráin annars at síggja á www.faroechess.com

# Spenningurin varðveittur

**Við sigrinum á havnarmonnum um vikuskiftið, hava vestmenningar framvegis møguleikan at endurvinna føroyameistaraskapin. Klaksvíkingar eru nú bert 1 stig fremstir áðrenn seinasta umfar komandi leygardag**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



*Martin Poulsen hevur ofta argað John Rødgaard, men hesa ferð noyddist hann at leggja kongin. Men tað tók veteraninum seks tímar, áðrenn hetta hendi*

Eins og í fjør er FM-heitið púra opið heilt fram til seinasta leik. Klaksvíkingar hava verið væltelvandi og støðugir, og higartil verið eina sponn framanfyri vestmenningar.

### Rødgaard vann á Martini

Martin Poulsen hevur seinastu árini argað John Rødgaard rættiliga fitt. Hóast ofta vinnandi støður ímóti júst Martini, hevur tað ikki eydnast Rødgaard at hála stigini inn, heldur tvørturímóti.

Men Rødgaard lat ikki Martin sleppa snikkaleysan úr trupulleikunum hesaferð. Tá teir, sum teir seinastu, sótu í drúgvum talvi, var støðan 2-1 til vestmenningar. Rødgaard hevði greiðan fyrimun, men tíðarneyð og treiskt verjuspæl vóru tungar forðingar. Loksins eftir nærum seks tímum legði Martin kongin.

Stytsta talvið var á 4. borði millum Óla Joensen og Jákup á Rógvu Andreasen. Støðan tóktist jøvn, men tá Óli knappliga var óneyvur, lumpaði Jákup hann og vann. Sigurð Justinussen og Samson Højgaard leiktu javnt á 3. borði. Sigurð hevði fyrimun í endatalvinum.

Martin Brekká, sum nú telvar við havnarmonnum, bjóðaði Carl Eli N. Samuelsen av á 2. borði. Hesin seinni vann sær eina finnu í rokmiklum miðspæli, men mátti seinni lata hana aftur, tí Brekká fekk vandamikið mótspæl. Eftir eina drúgva roynd, mátti Carl Eli ásanna, at hvørgin kundi vinna talvið, og tískil varð semja um javnleik.

Ein tryggur 3-1 sigur til verandi føroyameistararnar. Og úr Vestmanna frættist, at teir hava góðar vónir um enn eitt FM-heitið. Til tað krevst, at Havnin tekur nøkur stig frá Klaksvík 1, samstundis sum Vestmanna vinnur stórsigur á Klaksvík 2.

### Sandavágur vann botndystin

Hóast einki lið flytur niður í 2. deild í ár, hevur eingin hug at enda aftast. Í Klaksvík komu sandavágsmenn á vitjan, og teir fóru heim aftur við 2,5 stigum. Eitt gott úrslit hjá Torkil Nielsen & Co.

Trý talv endaðu við javnleiki, millum annað Rani Nolsøe og Olaf Berg á 1. borði, og tað varð tí Torkil Nielsen, sum avgjørdi dystin við sigri sínum á Terja Petersen.

### Fýra lið í oddinum

Í 2. deild kann valla verða javnari í oddinum. Vestmenningar hava framvegis leiðsluna, men nú er munurin bert 1 stig. Havnarliðini bæði kunnu við góðum úrslitum í seinasta umfari yvirhála vestmenningar, og toftamenn liggja somuleiðis og lúra á 4. plássi.

Klaksik 3 vinnur ivaleyst 3. deild. Skopuningar royn-ast væl eftir eini 10 ár í talvloysi. Eisini hava teir lið í unglingadeildini.

### Klaksvík kann vinna Unglingadeildina

Sera óvæntað taptu dreingirnir í Sandavágs Talvfelag ímóti Róki í unglingadeildini. Sandavágsdreingirnir hava nú telvað sín seinasta dyst í FM-kappingini og eru 2,5 stig framanfyri klaksvíksdreingir, sum hinvegin hava ein dyst eftir at telva. Og hesin verður ímóti Havnini, sum higartil ikki hevur megnað at arga oddaliðini.

Tískil kunnu teir úr Klaksvíkar Talvfelag vinna FM-heitið á seinasta leikdegi.

## Talvúrslit og -støður

### 1. deild

| | |
|---|---|
| Havnin-Vestmanna | 1-3 |
| Martin Poulsen-John Rødgaard | 0-1 |
| Martin Brekká-Carl Eli N. Samuelsen | 0,5-0,5 |
| Sigurð Justinussen-Samson Højgaard | 0,5-0,5 |
| Óli Joensen-Jákup á Rógvi Andreasen | 0-1 |
| Klaksvík 2-Sandavágur | 1,5-2,5 |
| Rani Nolsøe-Olaf Berg | 0,5-0,5 |
| Terji Petersen-Torkil Nielsen | 0-1 |
| Rani Baldursson-Bernhard Augustinussen | 0,5-0,5 |
| Rógvi Dragaberg-Jón Gregersen | 0,5-0,5 |

**Støðan í 1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Klaksvík 1 | 20,0 |
| 2 | Vestmanna | 19,0 |
| 3 | Havnin | 12,0 |
| 4 | Sandavágur | 11,0 |
| 5 | Klaksvík 2 | 9,0 |

### 2. deild

| | |
|---|---|
| Havnin 3-Vestmanna 3 | 4-0 |
| Sandavágur 2-Vestmanna 2 | 1,5-2,5 |
| Toftir-Havnin 2 | 2-2 |

**Støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Vestmanna 2 | 23,0 |
| 2 | Havnin 3 | 22,0 |
| 3 | Havnin 2 | 21,0 |
| 4 | Toftir | 20,0 |
| 5 | Sandavágur 2 | 17,0 |
| 6 | Vestmanna 3 | 5,0 |

### 3. deild

| | |
|---|---|
| Klaksvík 3-Vestmanna 4 | 4,0 |
| Havnin 4-Skopun | 2,5-11,5 |
| Sandavágur 4-Rókur | 0,5-3,5 |
| Sandavágur 3-Havnin 5 | 2-2 |
| Gøta-Klaksvík 4 | 2,5-1,5 |

**Støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Klaksvík 3 | 24,5 |
| 2 | Havnin 4 | 21,5 |
| 3 | Sandavágur 3 | 21,0 |
| 4 | Rókur | 20,5 |
| 5 | Havnin 5 | 18,5 |
| 6 | Skopun | 14,0 |
| 7 | Gøta | 13,5 |
| 8 | Klaksvík 4 | 10,5 |
| 9 | Sandavágur 4 | 9,0 |
| 10 | Vestmanna 4 | 3,0 |

**Unglingar**

| | |
|---|---|
| Klaksvík-Skopun | 2,5-11,5 |
| Sandavágur-Rókur | 1,5-2,5 |

**Støðan**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sandavágur | 22,5 |
| 2 | Klaksvík | 20,0 |
| 3 | Rókur | 15,5 |
| 4 | Havnin | 7,5 |
| 5 | Skopun | 6,5 |